## Andlát og jarðarferðir

**Esther Bertholdsen, Vágur** andaðist á Suðuroyar ellis- & røktarheimi 86 ára gomul í gjár 25 sept. Farið verður úr kappellinum fríggjakvøldið kl. 17.30 Jarðarferðin verður úr Bethel leygardagin 13.00. Tey, ið vilja minnast Esther, kunnu lata eina peingagávu til Akurin.

Kistan við **Marthu Joensen** kemur í kirkjuna í kvøld kl. 19. Bønarhald verður. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju í morgin kl 14. Tey, ið vilja minnast Marthu kunnu lata Missónshúsinum eina gávu.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Esther Bertholdsen**
Vágur

andaðist týsdagin 25. september, 86 ára gomul.
Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 17.30.
Jarðarferðin verður úr Bethel leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Kristian, Dánjal og Ann**

Tey, ið vilja minnast Esther, kunnu lata ein gávu til Akurin.

# Minningarorð um Hjarnar Johannesen

**f.26.09.2002 • d.18.12.2006**



18. desember er vanliga ein myrkur dagur á árinum. Bert fýra nætur frá at tað fer at ganga ímóti ljósari tíðum, sum vit øll jú gleða okkum til. Men hesin dagur stendur eftir í minni okkara sum ein sorgardagur. Hendan átjanda dagin í desember 2006, hendi tað, sum man vanliga heldur bert rakar onnur.

Ferðsluóhappið, sum hendi um 5 tíðina seinnapartin hendan dagin, og sum lítli Hjarnar var við í saman við foreldrum sínum og systur sínari, var so ógvusligt, at hetta kravdi lív hansara. Okkara lítli og elskaði Hjarnar Johannesen bleiv tikin frá okkum bert 4 ára gamal. Órímiligt, óskiljandi og so stutt undan jólum. Men Harrans vegir eru ikki okkara vegir, sigur halgabók, sum kann vera sera torfør at skilja í løtum sum henda.

Elskaði Hjarnar

Tað er ógvuliga svárt hjá okkum at skriva minningarorð um teg. Ógvuliga tungt kennist tað hjá okkum, at vit ikki kunnu gleðast saman við tær á tínum 5 ára føðingardegi í dag, 26. september. Vit sakna teg. Minnini um teg goyma vit í hjørtum okkara.

Í jólavikuni bleivst tú brádliga tikin frá okkum. Tað var tungt at fáa boðini, at tú ikki vart ímillum okkum longur. Tá tílíkt hendir, gerst alt annað líkamikið. Tað kenst, sum tíðin hon steðgar upp, sjálvt um hon onkursvegna tó gongur skjótt. Aftan á 9 mánaðir er saknurin enn líka stórur, og tú ert í okkara tonkum hvønn dag. Tú fylti so nógv í okkara lívi, vart ein so glaður og lívligur drongur.

Í august mánaði vóru tit og ferðaðust á Rhodos. Har svam tú dagin langan og væl dámdi tær eisini at flúgva. Hesin túrur var eitt satt upplivilsi hjá tær. At hetta skuldi vera tín seinasta feria vardi okkum ikki.

Væl dámdi tær at tekna og skriva, og nakað áðrenn tú bleivst 4 ár, lærdi tú teg at skriva 4 talið. Tú vart so upptikin av teimum, og tey vendu allar vegir. Væl dámdi tær eisini at baka, og dagin fyri vanlukkuna, bakaðu tú og mamma tín køkufigurar til jóla. Tú slapst eisini at pynta jólatræið í skúlanum fyrst í desembur, og tað vart tú so glaður fyri.

Jólini 2006 vóru sorgarbundin við nógvum tungum løtum og gráti. Tað er ikki lætt at finna gleðina fram, tá ið deyðin so brádliga í einari »gleðistíð« krevur sítt.

Góðu tit. Kirstin, Sofus, Rókur og Ronja. Ógvuliga tung er henda sorg at bera, men tá á stendur fáa vit aðra styrki at koma víðari við. Jesu pápi styrki tykkum.

*»Tann ið verður sum hetta lítla barnið, eyðmjúkt og álitisfult, skal gerast tann størsti í Himmiríkis ríki«*

*Matt.18,4*

Við hesum orðum vilja vit lýsa vit frið yvir minnini um okkara lítla fitta Hjarnar.

**Omma, mostrar og mammubeiggjar**

Sosialurin

**Dagurin**
**27. september. Kosmus** (eisini skrivaður Cosmas), deyður umleið ár 300. Tikin av døgum undir Diocletianus keisara

# Dupultkvartettin syngur saman við Larry Ford

**TÍÐINDASKRIV**

Kendi amerikanski gospelsangarin Larry Ford kemur til Føroya 1. oktober og syngur á stórari sangløtu í Ebenezer um kvøldið saman við Dupultkvartettini og Ebenezerkórinum. Dagarnar frammanundan hevur hann sungið í Svøríki, Noregi og Danmark. Á konsertunum í Hirtshals 27. og í Keypmannahavn 30. september syngur Dupultkvartettin í Ebenezer eisini.

Dupultkvartettin í Ebenezer er boðin til Danmarkar síðst í hesum mánaðinum at syngja á tveimum konsertum saman við kenda amerikanska gospelsangaranum Larry Ford. Tann fyrra verður í Hirtshals hóskvøldið 27. september kl. 19 í Nordsømuseet, Multihallen, Willemosevej 2, og tann seinna sunnukvøldið 3. september kl. 19 í Keypmannahavn í “Templet”, salinum hjá Frelsunarherinum á Frederiksberg Allé 9. Dupultkvartettin kemur at hita upp, áðrenn Larry Ford kemur á pallin, men kemur eisini at syngja nakrar sangir saman við honum.



*Larry Ford*

Á Danmarkarferðini kemur Dupultkvartettin eisini at syngja í Kristnastovu í Birmavej 36 á Amager. Tað verður á fundinum fríggjakvøldið 28. september kl. 20 (sí heimasíðuna hjá Kristnastovu: www.kristnastova.dk). Sunnumorgunin 30. september kl. 10.30 syngur Dupultkvartettin á fundinum hjá Kristent Fællesskab, Højnæsvej 60, Rødovre.

Mánamorgunin 1. oktober kemur Dupultkvartettin aftur til Føroya, og tá er Larry Ford við í ferðalagnum. Sama kvøldið kl. 20 verður stór sangløta í Ebenezer, har Larry Ford kemur at syngja. Umframt Larry koma Ebenezerkórið og Dupultkvartettin at luttaka, og eisini verður felagssangur á skránni. Øll eru hjartaliga vælkomin til sangløtuna, sum verður ókeypis, og vóna vit, at Ebenezer verður fult tað kvøldið.

### Larry var her í 2004

Larry Ford hevur verið einaferð áður í Føroyum. Tað var í mai 2004, tá ið hann sang á konsert í eini fulsettari ítróttarhøll á Eiði. Larry Ford er ein av kendastu gospelsangarum í USA. Hann hevur sungið southern gospel tónleik í mong ár bæði sum solistur og í so kendum kvartettum sum The Blackwood Brothers. Eisini hevur hann sungið nógv við í bólkinum Homecoming Friends hjá Bill Gaither, sum telur nógvar av bestu southern gospel sangarum og tónleikarum. Nógvir føroyingar kenna tey frá fløgum og videobondum, har tey syngja nógvar av kendu ensku og amerikansku sálmunum. Meira um Larry Ford á heimasíðu hansara: www.larryford.com.

Ikki er neyðugt at siga so nógv um Dupultkvartettina í Ebenezer. Teir hava sungið at kalla uttan íhald síðan 1978 og eru kendir av øllum føroyingum fyri sín vakra sang, sum oftast framførdur acapella, tvs. uttan ljóðføri. Teir hava eisini sungið uttanfyri landoddarnar og hava givið plátur, bond og fløgur út.



*Dupultkvartettin í Ebenezer*